

*- Tey, sum vilja hjálpa okkum at geva russum eina jólagávu, kunnu venda sær til Faroe Agency á tlf. 351990 ella á gsm 231990 – og telefonirnar svara allan sólarringin, sigur Árni Dam*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Ein jólagáva til russisk sjófólk

**- Út við 1000 russar, sum ikki sleppa heim til síni kæru á jólum, eru her rundan um høgtíðina. Í fleiri ár hava vit givið teimum jólagávur, og tað hevði glett okkum, um samkomur, sjómanskvinnuringar og fyritøkur aftur í ár stuðlaðu okkum í at geva hesum fólkum, sum eru so langt heimanífrá á jólum, eina jólagávu, sigur Árni Dam, russiskur umboðsmaður í Føroyum**

JÓLAHØGTÍÐIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá ið flaggskipið í føroyska fiskiskipaflotanum, Atlantic Navigator, fór fyrsta túrin herfyri, fekk manningin jólapakkar umborð, sum sjómanskvinnuringarnir kring landið hava latið. Væntandi er ikki, at manningin verður heima um jólini, og tí syrgdi sjómansmissiónin fyri, at manningin fekk jólapakkar.

Men tað er ikki bara Atlantic Navigator, sum verður burtur á jólum. Vit hava eisini onnur langfaraskip, sum eru langt burtur av landi, nú jólini rættiliga stunda til. Eisini hesar manningar fingu jólapakkar, tá ið seinasti túrurin undan høgtíðini byrjaði. At enda hava vit nógv fólk í farmaskipasigling á øllum heimshøvum, og hjá mongum av teimum b‡ðst heldur ikki høvi at vera heima á jólum.

Afturvendandi jólaheilsurnar geva okkum eina hóming av, hvar føroyingar umborð á føroyskum og fremmandum skipum balast, tá ið vit onnur hugna okkum heima við hús saman við familju, vinum og kenningum.

### 1000 russar

Men tað eru ikki bara føroyskir fiskimenn og føroysk sjófólk, sum heimanífrá á jólum.

Árni Dam, russiskur umboðsmaður í Føroyum, veit at siga, at út við 1000 russar, sum ikki sleppa heim til síni kæru á jólum, eru í Føroyum rundan um høgtíðina.

Nøkur skip liggja á Sundi, og skip hava eisini ligið í Kollafirði. Haraftrat liggja skip á reduni.

- Russarar koma og fara, men eg vil meta, at út við 1000 russarar, sum ikki sleppa heim á jólum, eru her rundan um jólahøgtíðina.




*- Tað, at vit føroyingar geva russiskum sjófólki jólagávu, verður – sum Árni Dam tekur til – "rapporterað" til russisku sendistovuna, sum afturvendandi vísir sítt takksemi fyri hesa góðu gerð mótvegis teirra siglandi fólki Mynd: Vilmund Jacobsen*

Árni Dam vísir á, at í fleiri ár hava føroyingar givið russiskum sjófólki, sum eru her um okkara leiðir um høgtíðina, jólagávur, og tað eru teir sera glaðir og takksamir fyri.

### 1000 jólagávur

- Aftur í ár savna vit inn jólagávur til russisku sjófólkini, og tí hevði tað glett okkum almikið, um samkomur, sjómanskvinnuringar og fyritøkur aftur í ár stuðlaðu okkum í at geva russunum eina jólagávu, sigur Árni Dam, russiskur umboðsmaður í Føroyum

Hann vísir á, at bæði samkomur, sjómanskvinnuringar og fyritøkur hava verið ófør at koma við gávum, ið Faroe Agency, sum Árni Dam rekur, síðan fær umborð á russisku skipini, sum liggja við bryggju og eru úti á reduni.

- Eingin ivi skal vera um, at hetta hevur stóran týdning fyri russisku sjófólkini, og úr Ruslandi hoyra vit mangan, hvussu vinsælir og gestablíðir vit føroyingar eru sum fólk.

### Ein góð gerð

Árni Dam vísir á, at tað at geva eina jólagávu kanska ikki ljóðar av nógvum, men hann er onga løtu í iva um, at hetta eisini hevur týdning fyri góða samstarvið, sum er millum russiskar og føroyskar myndugleikar á fiskivinnuøkinum.

Tað, at vit føroyingar geva russiskum sjófólki jólagávu, verður – sum hann tekur til – "rapporterað" til russisku sendistovuna, sum afturvendandi vísir sítt takksemi fyri hesa góðu gerð mótvegis teirra siglandi fólki.

Hann væntar, at eini 10 russisk skip við millum 70 og 92 fólkum umborð eru her um okkara leiðir – frá nú av, og til jólini eru av.

### Latið frætta

- Tey, sum vilja hjálpa okkum at geva russum eina jólagávu, kunnu venda sær til Faroe Agency á tlf. 351990 ella á gsm 231990 – og telefonirnar svara allan sólarringin, sum Árni Dam tekur til.

Hann sigur, at tað var til jólini í 1981, at stig vórðu tikin til at savna inn jólapakkar til russisk sjófólk, og hetta hevur verið gjørt síðan.

- Higartil hava tvær manningar fingið jólarpakkar, men tað plagar at vera soleiðis, at flestu sjófólkini fáa ein jólapakka í part, tá ið saman um kemur, sigur Árni Dam.

Í Ruslandi halda tey ikki jól somu dagar sum vit, men jólini verða í staðin hildin 6. og 7. januar.